VARPIÐ

4

Friggjadag 17. kl. 16.40

Gyltir tímar

"Dansk herrehåndbold i verdenseliten". Nú HM í manshondbólti stendur fyri framman, hava tey á DR verið á ferð í bandageymslunum. Sýnd verða hæddarpunkt úr HM í 1967 og 1978, har Danmark í báðum førum staðfesti seg sum ein av heimsins sterkastu hondbóltstjóðum.

Friggjadag 17. kl. 18.00

Fres

Angela er aftur farin at ferðast og hesaferð gongur leiðin til Norðoyggjar, men Angela hevur ikki peikað enn, so vit vita ikki navnið á bygdini. Olgar hevur fingið fepur, so hann er ikki við í Norðoyggjum, men Hannibal, hann er við, og vónandi dugir hann betri at koyra bil nú. Renata kemur eisini í Fres.

Friggjadag 17. kl. 18.30

Barnagentan

Maggie skal giftast. Sheikur hennara, Michael, skal til Japan at arbeiða í eitt ár, og tí frígjar hann til Maggie, áðrenn hann fer. Konufólkini í húsinum eru sjálvandi ovurfegin, men Maxwell hevur eitt heilt annað sjónarmið. Tá Maggie so kortini ætlar sær at siga ja, er sjálvsagt, at ruðuleiki kemur í.

Friggjadag 17. kl. 20.05

Gift við mafiuni

Angela Demarco er unga einkjan eftir einum myrdum mafiamanni, og nú vil hon sleppa burtur úr kriminella umhvørvinum. Hetta gerst tó ikki lættari, tá bæði mafiabossurin Tony Russo og FBI-agenturin Mike Downey vilja hava hana sum unnustu.

Leygardag 18. kl. 12.05



Sætti dagurin

Talan er her um ein action-fyltan framtíðar film um ein pápa, sum kemur heim frá arbeiði. Her finnur hann út av, at vísundin hevur gjørt eitt kopi av sær, sum eisini er sett í hansara stað. Hetta vil hann ikki lata sær lynda, og fer hann tí undir eitt lívshættisligt stríð til tess at vinna sín egna identitet aftur.

Leygardag 18. kl. 19.00

Tomb Raider

Hetjan Lara Croft, sum eisini er kend úr telduspælinum, leitar eftir altfevnandi megini. Hendan finst í eini tvíbýttari, aldargamlari artefakt í Cambodja og í Sibiria. Lara er tó ikki tann einasti, sum leitar eftir hesum, og hetta er sjálvandi nakað, sum ávirkar gongdina í filminum. Í høvuðsleiklutunum síggja vit Angelina Jolie, Jon Voight og Ian Glen. Leikstjórnað hevur Simon West

Leygardag 18. kl. 20.00



SATSA

Í 21. sendingini av Satsa verða tað tey trý, Inger Jacobsen, Kaldbak, Niels Jákup Heinesen, goymslumaður, Tórshavn og Herman Mohr Hermansen, Tórshavn, sum skulu dystast um, hvør teirra skal vinna seg víðari í kappingini.

Leygardag 18. kl. 21.00

Colors

Teir báðir løgreglumenninir, Bob Hodges og Danny McGavin, eru starvsfelagar í C.R.A.S.H. Ein sjónvarpssending í Los Angeles, har endamálið er at minka um harskapin, sum er á gøtunum. Tað er tó ikki altíð sol lætt at vera sjónvarpsvertur í slíkari sending, tí órættvísi er somikið stórt, at tað slepst ikki undan at verða ávirkaður av hesum.

Sunnudag 19. kl. 10.30

Maven er mit centrum

Fylgt verður við trimum børum, sum øll bíða eftir at gerast foreldur. Hyggjarnir síggja, hvussu vónir og gleði skiftir til ótta og ótrygdleika, nú tey skulu venja seg til, at tey framyvir koma at hava heilt aðrar leiklutir.

Sunnudag 19. kl. 15.10

Ull og spuni 3:3

Søgulig frágreiðing um føroyska síðvenju innan seyð, ull og spuna.
Hetta er ein sendirøð í trimum pørtum, sum Føroya Heimavirkisfelag hevur framleitt. Greitt verður frá, hvussu vanliga varð arbeitt við ull frá tí at seyðurin verður kliptur til ullin er spunnin til tógv og nýtt til binding, veving og annað.

Sunnudag 19. kl. 21.00



Enemy of the state

Tá advokaturin Robert Clayton Dean heilt tilvildarligt hittir ein av fyrrverandi starvsfeløgum sínum, veit hann ikki, hvat bíðar honum. Robert fær ein sendingu, men tá vinurin verður myrdur beint eftir hetta, gerst Robert greiður um, at hann uttan iva hevur nakrar vandamiklar upplýsingar í varveitslu.

Sunnudag 19. kl. 21.15

Hjálp frá einum fremmandum

Jack Bauer arbeiðir í eini teldufyritøku, og hann at kalla lívir og doyr fyri starv sítt. Ein dagin lærir hann tó at síggja lívið úr øðrum sjónarhornum. Á veg heim frá arbeiðinum finnur hann eina dukku, og tó at hendan er merkt, Jack Bauer er ansat i et computerfirma og lever og ånder for sit arbejde. Lige indtil han en dag kommer til at se på sin tilværelse med helt nye øjne. På vej hjem fra arbejde finder han en dukke i undergrundsbanen. Dukken er mærket, så Jack vil nemt kunne

Mánadag 20. kl. 18.00

Frasier

Niles vil fegin, at hann kann skriva rithøvundur á visitkortið, men hetta er ikki so lætt. Útgevarin er nevnliga bert áhugaður, um Niles eisini fær kenda beiggja sín at standa fyri bókini. Ímóti sínum vilja kemur Frasier soleiðis upp í leikin, men hetta verður tó ikki uttan trupulleikar av ymsum slag.

Mánadag 20. kl. 19.55



A Bronx Tale

Robert de Niro debuteraði sum leikstjóri við hesum væleydnaða filminum um 9-ára gamla Calogero. Hann veksur upp við tveimum fullkomuliga ólíkum fyrimyndum. Sínum hart arbeiðandi og heiðurliga pápa, og so mafiabossinum í grannalagnum, sum eisini verður eitt slag av pápa hjá lítla dreinginum.

Mánadag 20. kl. 21.10

HM-hondbóltur í SvF

HM í hondbólti — menn - setur sín dám á skránna komandi 2 vikurnar. Sjónvarpið fer at vísa umleið 12 dystir, semifinalur og finaluna 2. februar. HM-hondbóltur í Portugal frá 20. januar til 2.februar. Í kvøld 20. januar sendir SvF tveir dystir kl. 21.10 Danmark-Slovenia og kl. 23.00 Portugal-Grønland. Týskvøldið 21. januar kl. 22.40 Brasilia-Danmark. Hóskvøldið 23. januar kl. 20.25 Danmark-Algeria.

Mánadag 20. kl. 21.30

Ein kúla fyri lívið

26 ára gamli Kenneth verður skotin í høvdið av einum rockara, tá teir eru í balli í fótbóltsfelagnum. Læknarnir geva honum ikki nógvar møguleikar, tí kúlan er farin inn at heilanum, men onkursvegna kemur Kenneth Livandi frá hendingini, sum í nógvar mátar gerst ein stór broyting hjá honum.

VARPIÐ

Eykablað í Sosialinum
hvønn fríggjadag

Postsmoga 76
110 Tórshavn
Telefon: 311820
Fax: 314720
e-mail: varp@sosialurin.fo

Útgáva: Sosialurin
Umbróting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

Týsdag 21. kl. 19.00

Canonball Run

Øll eru nú gripin av intensitetinum í Canonball Run. Starturin er í Texas, og bæði á tosinum innanhýsis á liðunum og ikki mint millum liðini skilst, at tónin er alt annað enn bleytur. Third Wheel og Castaways gera eina aftalu um, hvussu teir skulu koyra, og tað er ikki víst, at øll er eins fegin um hetta.

Týsdag 21. kl. 19.30

Lívið umborð - so kava vit

25 mans og ein kvinna eru á ferð við kavbátinum hjá sjóverjuni, Springeren. Carsten Fischer greiðir frá um lívið umborð, har tað ikki er rúm fyri erkvisni, meðan sjálvsálitið og sjálvandi skrokkurin skulu vera í lagi.

Týsdag 21. kl. 20.40



The Cider House Rules

Wilbur Larch, lækni hevur stýrt foreldraloysingin Homer Wells til sín. Wilbur er leiðari á einum heimi fyri foreldraleys børn, har hann ætlar sær Homer sum eftirmann sín, men ein dagin koma Candy og Wally til heimið at fáa fosturtøku og Homer velur at fara við teimum aftur til súreplagarðin hjá Wally, har hann varð føddur? Filmurin er óhóskandi fyri smáborn Leikstjórn: Lasse hallström.

Týsdag 21. kl. 22.30

Myrkursins tími

Eftir kríggið í 1991 er oyðimørkin í Kuwait at sammeta við svartasta helheimin. Bert oljukeldurnar síggjast strekkja sínar risastóru flammur upp móti himmalrúminum. Eitt kríggj, sum fyri altíð kemur at merkja litla landið.

Mikudag 22. kl. 12.25



Syndarar í summarsól

Fýra menn og fýra kvinnur búgva í einum húsum við Skergarðin. Tey njóta summarið, arbeiða við ymsum ætlanum og droyma um eina tíð við opinleika, vinarlagi og kærleika. Men so kemur tann frísinnaði Evelyn úr Paris.

Mikudag 22. kl. 20.00

Undan Væðingini

Kanska um hundrað ár 1:4. Fyri tveimum árum sóu vit eina sendirøð um skaldið Hans Andrias Djurhuus, sum Hanus Kamban gjørdi. Men hetta var ikki fyrsta ferðin, at Hanus gjørdi sjónvarp. Longu í 1989 gjørdi hann eina sending í fýra pørtum um skaldið og sakføraran Janus Djurhuus. Vit hava leitað hana fram og senda fyrsta part í kvøld.

Mikudag 22. kl. 20.00

Mayday

Á brúnni. Hugt verður at fleiri málum, ið menniskjanslig mistøk eru íblandaði, og sum hava havt nakrar av størstu vanlukkunum í alheims sjóferðslusøguni við sær.

Mikudag 22. kl. 20.45

Tey frávaldu

Hópuppsagnir. Hvat hendir við fólki, ið verða hótt av uppsagnum? Tá ið virkir boða frá skerjingum, ið føra við sær hópuppsagnir.
TV2 dok. hevur í eitt hálvt ár fylgt teimum, ið kenna seg hótt av skerjingunum á Ørskov Stålskibsværft í Frederikshavn. Eitt hálvt ár í vón, óvissu og frustratión. Starvsfólk, ið óttast fyri at missa samleikan. Álitisfólk, ið royna at troysta starvsfeløgar. Og stjórin, ið sær lívsverkið syndrast.

Hósdag 23. kl. 13.45

Bruno

9 ára gamli Bruno er eitt sindur løgin. Klæði hansara eru ávirkað av mammuni, sum er klædnaskapari. Bruno tekur í lut í eini rættstavingarkapping á katólska skúlanum, har hann hittir sjálvan pávan, og hetta fær avgerandi avleiðingar fyri dreingin.

Hósdag 23. kl. 18.20

The Island of Dr. Moreau

Í 2010 í myrka frumskóginum á eini fjarskotnari oyggj. Dr. Edward Moreau hevur saman við hjálparmanni sínum umgjørt djór til menniskju – eitt slag av yvirveru. Ætlanin við hesum var sum so góð, men heldur enn at gera nakað gott, hava teir við hesum skapt eitt helvíti á jørð.

Hósdag 23. kl. 20.00



Rættartøkningarnir

Stolin samleiki. Í hesi sendingini síggja vit mordarar, sum drepa fyri at fáa fatur á peningi og einum nýggjum samleika. Millum annað síggja vit eina kvinnu, sum eyðkennir líkið á systir sínari, men sambært almennu hagtølunum er systirin framvegis á lívi.

Hósdag 23. kl. 21.40

Gesturin

Heimavitjunartænasta er nýggj fyribyrgjandi tænasta á eldraøkinum í Føroyum, sum fyribils bert er sett í verk í Tórshavnar kommunu. Talan er um tilboð til eldri fólk yvir 80 ár, har dentur verður lagdur á at práta um gerandisvanar og trygdarskifti og ráðgeving og vegleiðing í sambandi við praktiskar spurningar. Somuleiðis verður áherðsla løgd á týdningin, at tey eldru røra seg og eta rættan og sunnan mat. Jónvør Christiansen sjúkrarøktarfrøðingur røkir hesa tænastu í Tórshavnar kommunu, og hon er gestur hjá Leivi Hansen.

Mikudagur 22. kl. 19.30

Fólk og frítíð

Beint undan jólum komu tær fýra, Kristin Stampe, Sigrid á Høvdanum, Malan Isaksen og Hjørdis Sigurdsdóttir Isaksen, heim aftur, eftir at hava verið á klænkiskeiði á Ebeltoft Kurcenter. Í sendingini skifta vit orð við tær um hví tær júst valdu Ebeltoft Kurcenter, um mat- og gerandisvanar áðrenn og aftaná, og í hvønn mun broytti lívsstílurin ávirkar familjuna. Eisini fer Sigrid á Høvdanum at borðreiða við einum bita, sum hóast vælsmakkandi, letur teg sita eftir við góðari samvitsku. Gunnar Nolsøe leggur til rættis.

Hósdagur 23. kl. 19.00

Tilvera: Alt her í lívinum er eitt val

Vit tosa við nunnuna Mariu, hví hon ikki er gift. Johan sigur frá, hvussu tað var at verða skildur og Maureen Clarke sigur frá, tá hon og Christoffur giftust í Onglandi.

Ítróttur

HM-hondbóltur úr Portugal

Leygardagin kl. 14.00
Tipslørdag: Nottingham Forest-Crystal Palace

Leygardagin kl. 14.50
League Leygardagur
Sunnudagin kl. 13.55
Premier League: Arsenal-West Ham
Sunnudagin kl. 15.55
Premier League: Fulham-Middlesbrough
Sunnudagin kl. 20.10
NHL: Florida-Ottawa

Leygardagin kl. 19.25
Seria A, beinleiðis
Sunnudagin kl. 19.25
Seria A, beinleiðis
Mánadag kl. 14.00
NHL: Atlanta-N.Y. Islanders

Sunnudgain kl. 15.15
CL-hondbóltur: Viborg-Herz Budapest, kvinnur
Mánadagin kl 10.00
V5-travet
Mikudagin kl. 21.00
Hondbóltur: Ikast-Kolding, kvinnur
Hósdagin kl. 22.25
Svimjing: Copenhagen Challenge

Sunnudagin kl. 14.30
V5-travet

Beinleiðis á Eurosport hesa vikuna
Tennis: Australian Open
WC-strok úr Wengen, Schweiz.
WC skíðskjóting úr Ruhpolding, Týsklandi
WC Super-G úr Cortina d'Ampezzo, Italia
WC bobsleðu úr St. Moritz, Schweiz.
WC langrenn úr Nove Mesto, Kekkia
WC sleðu úr Lillehammer, Noreg
WC skíðlop úr akopane, Pólandi
Rally: Dakar 2003

Beinleiðis HM-hondbóltur
Sunndagin kl. 15.10
NFL: Gameday
Mánadagin kl. 11.20
NHL: NFC finalan

Sunnudagin kl. 11.00
Nevaleikur, beinleiðis úr USA

Mánadagin kl. 13.20
NBA kurvabóltur

VARPIÐ

5